

*Tey 6 starvsfólkini í Gamla Bókahandli eru til reiðar at taka ímóti kundunum í nýumvældu hølunum – uttast høgrumegin stendur leiðarin, Vagn Andersen.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Gamal bókahandil í nýggjum hami

**Í morgin letur H. N. Jacobsens bókahandil upp í nýumvældum hølum á Vaglinum í Havn.**

BÓKAHANDIL
*Snorri Brend*

**Havn:** Hóast bókahandilin nú letur alment upp, so verður ikki gjørt tað stóra burtur úr degnum í morgin.

Tað verður hinvegin gjørt um ein mánað ella so.

- Vit bíða eftir at Kunningarstovan flytir inn í hølini við síðuna av okkum. Hetta verður um 1. desember, og tá verður meiri gjørt burtur úr, sigur leiðarin í bókahandlinum, Vagn Andersen.

Í nýumvældu hølunum hevur bókahandilin ikki beinleiðis fingið so nógv meiri pláss aftrat. Høvuðsbroytingin er hon, at nú er allur handilin so at siga í einum.

- Fyrr vóru nógv smá rúm, men tey eru burtur nú, sigur Vagn.

Meðan umvælingin av hesum gamla og stásiliga bygningi er farin fram, hevur handilin verið opin.

Í farnu viku var hann kortini stongdur í nakrar dagar, men læt upp aftur mánadagin.

Nú Gamli Bókahandil letur upp aftur í morgin, bjóðar hann viðskiftafólkum sínum nøkur góð tilboð upp á bøkur.

# DJ-lánini sera væl móttikin

**Suðuroyar Sparikassi ætlar at koma við einum nýggjum produkti á hvørjum ári. Ársins produkt var í øllum førum væl móttikið**

SPARIKASSAR
*Snorri Brend*

**DJ-lán:** Ikki kann sigast annað, enn at nýggja ætlanin hjá Suðuroyar Sparikassa við teim sonevndu DJ-lánunum hevur verið væl móttikin av fólki.

Søren Bruhn, stjóri í sparikassanum sigur, at higartil eru 15 % av húslánunum eftir hesi skipanini.

Og verður gongdin hin sama restina av árinum, so verða helst eini 25 % av lánunum innan ársskiftið eitt DJ-lán.

Undirtøkan er so stór, at




*Nýggja DJ-lánið hjá Suðuroyar Sparikassa er ein dundrandi succes*

tey í tíðarbilum ikki hava kunnað arbeitt allar umsóknirnar undan beinanvegin. Tey hava ístaðin verið noydd at skriva nøvnini niður á fólkunum, og síðani viðgjørt umsóknirnar sohvørt.

Við nýggja DJ-láninum bjóðar Suðuroyar Sparikassi kundunum tveir avdráttarfríar mánaðir um árið - t.d. mánaðirnar desember og juni – sum navnið á hesum láninum ber heiti eftir.

Søren Bruhn upplýsir, at hetta produktið er bara eitt av mongum øðrum, sum teir arbeiða við. Teir miða eftir at hava eitt nýtt produkt á hvørjum ári.

## Ungdómsgudstænasta í Vesturkirkjuni

**Havn:** Hóskvøldið kl. 20 verður spennandi ungdómsgudstænasta í Vesturkirkjuni, har Bergur D. Joensen prædikar.

Tað verður tó ikki bert prædika, tí nógvur sangur er eisini á skránni.

TenSing-kórið hjá KFUM & K í Havn, Sound of Glory fer at syngja, eins og ung úr Meinigheitshúsinum í Havn koma at standa fyri felagssangi, sum ungum dáma.

Innihaldið í prædikuni verður um líðing og óndskap, og um Jesus, sum Gud sendi í heimin at hjálpa og verja okkum. Ein heldur øðrvísi altargangur verður eisini.

- Møguleiki verður eisini at tendra eitt ljós fyri einum sum farin er, ella einum, sum ein er góður við og ynskir at Gud skal vera hjá ella hjálpa, upplýsir sóknarpresturin, Bergur D. Joensen.

Í mai mánaði var ein líknandi ungdómsgudstænasta í Vesturkirkjuni. Og sum skilst so miðar presturin eftir at hava eina ungdómsgudstænastu hvørt hálvár.

Ungdómsgudstænastan vendir sær til øll ung. Konfirmantar, sum ganga at lesa nú, og sum hava gingið at lesa, eru vælkomnir eins og ung í øllum aldri.

**sb.**



*TenSing-kórið hjá KFUM & K í Havn, Sound of Glory fer at syngja við ungdómsgudstænastuna í annaðkvøld*

## Stuðul til endurvarpara hjá Rás 2

**Sundalagið:** Eitt av málunum á bygdaráðsfundinum í Sunda kommunu í farnu viku var eitt mál um stuðul til eina av útvarpsstøðum okkara, Rás 2.

Málið snúði seg um eina umsókn um fíggjarligan stuðul til at seta ein endurvarpara upp oman fyri Nesvík. Á henda hátt fær fólkið í Sundalagnum møguleika at hoyra sendingarnar hjá støðini enn betri.

Fíggjarnevndin í kommununi samtykti at játta 25.000 kr. til hetta endamálið, og á bygdaráðsfundinum varð hetta einmælt samtykt.

Hetta er ikki fyrsta kommunan sum soleiðis hevur stuðlað Rás 2. Frammanundan hava felagskommunan í Vágum, Vestmanna kommuna og kommurnurnar eystan Múla í Norðoyggjum somuleiðis stuðlað hesi útvarpsstøðini, hvørs heimstaður er Søldarfjørður.

**sb.**



*Fólk í Sundalagnum fáa nú møguleika at koyra – og hoyra betri – sendingarnar hjá Rás 2*